Tryggingar & eftirløn

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Vælkomin

VÆLKOMIN

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag bjóðar limum sínum trygging í samstarvi við Tryggingarfelagið LÍV.

Avtalan er galdandi fyri virknar limir og tekur við, tá byrjað verður í starvi.

Innliman er treytað av fullum arbeiðsførleika. Arbeiðsgevarin váttar arbeiðsførið.

Tryggingin fellur burtur mánaðin eftir, at tú fyllir 67 ár, um tú ikki longur ert virkin limur ella fer úr starvi.

Verður farið úr skipanini innan eftirlønar-aldur, kann framhald av tryggingini avtalast við LÍV.

SAMLAGSTRYGGING

Tryggingarparturin er skipaður sum samlagstrygging og gevur rætt til útgjald:

- við deyða
- við ávísum hættisligum sjúkum
- lokaupphædd

Tryggingarskeiðið er fram til fylta 67. ár.

Eitt møguligt útgjald er skattafrítt.

TILSKILAN

Við deyða innan fylta 67. ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin sambært tilskilan.

Útgoldið verður til „næsta avvarðandi", um ikki onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV.

„Næsti avvarðandi" er í fyrstu atløgu eftirsitandi hjúnafelagi. Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til børnini. Eru eingi børn verður útgoldið sambært testamenti/arvalógini.

Ynskist tryggingarupphæddin útgoldin til onnur enn „næsta avvarðandi" t.d. sambúgva, skal hetta fráboðast LÍV skrivliga.

Skjalið „Broyting av tilskilan" finnur tú liv.fo/tilskilan

Kundin eigur LÍV

Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Ráðgeving

Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum á LÍV.

P/F Tryggingarfelagið LÍV
Kopargøta 1
Postboks 206
110 Tórshavn

Tlf. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

Skrivstovutíðir:
Mánadag-hósdag: 10.00-16.00
Fríggjadag: 10.00-15.00

Trygging

Við deyða

Útgoldið verður til tann/tey, ið skrásett eru sum tilskilað.

Tryggingin er galdandi bæði í arbeiði og frítíð.

Útgoldið verður uttan mun til, um deyðin skyldast sjúku ella vanlukku.

Upphæddin verður útgoldin í mun til aldur, sum víst niðanfyri.

Ávísar hættisligar sjúkur

Útgoldið verður, um

tú ella

børn undir 18 ár

verða rakt av "ávísari hættisligari sjúku".

Nærri ásetingar og listin yvir fevndar sjúkur er at finna í tryggingartreytunum.

Óarbeiðsføri

Verður arbeiðsorkan skerd við 2/3 ella meira, fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri.

Eftir hetta rindar LÍV tryggingargjaldið so leingi óarbeiðsførið stendur við. Tó í mesta lagi 3 ár.

Ískoyti til hoyritól

Fært tú almennan stuðul til hoyritól, hevur tú eisini rætt til útgjald frá LÍV.

LÍV rindar í mun til almenna stuðulin og veruliga kostnaðin.

Endurgoldið verður upp til kr. 4.000 fyri hvørt hoyritólið.

Lokaupphædd

Eftir neyvari ásetingum hjá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag verður upphæddin útgoldin í einum, tá tú verður 67 ár.

Møguligt er eisini at søkja um útgjald eftir 60 ára aldur. Tá er upphæddin við 60 ár 1/8 av fullari upphædd, við 61 ár 2/8, við 62 ár 3/8 o.s.fr.

Skattafrí upphædd
Við deyða

14-49 ár	kr. 400.000
50-66 ár	kr. 300.000

Skattafrí upphædd
Ávísar hættisligar sjúkur

Limur	kr. 125.000
Børn u/18 ár	kr. 125.000

Skattafrí upphædd
Hoyritól

Upp til kr. 4.000 fyri hvørt hoyritólið

Skattafrí upphædd
Full lokaupphædd

2021	kr. 100.000

Innlit

Kundaportalur

Á kundaportali okkara "Mítt LÍV" fært tú innlit í uppsparing, persónligar tryggingar, samlagstrygging, inngjøld og teknisku uppgerðina.

Kundaportalin finnur tú á www.liv.fo

Ritast kann inn við Samleikanum

Hevur tú ikki Samleikan, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á LÍV.